## Teldutilboð til KT Landsins

KT Landsins hevur fingið áheitanir frá Fíggjarmálaráðnum og stovnum í Landsnet, um at skipa fyri felags innkeypi av telduútbúnaði fyri at tryggja stovnunum besta møguliga prís. Sum eina roynd at røkka hesum máli ynskir KT Landsins at biðja um tilboð uppá eina størri mongd av farteldum. Teldurnar skulu fyri tað mesta brúkast til vanligt kontór brúk t.e. tekstviðgerð, rokniark, framløgur, journal, internet o.s.fr. Dentur skal leggjast á at teldurnar skulu vera teldurøðir, sum eru ætlaðar til Business/Professional brúk.

Hervið verður biðið um tilboð uppá:

30 stk. farteldur við tilhoyrandi dokking støð.

Minstu krøv til telduútbúnaðin eru hesi:

- 14” skerm
- Metall ella kolfibur kabinet
- Intel I5 processor - 4rd generation
- 256GB SSD Harddisk
- 8GB RAM
- Intel vPro
- TPM (Trusted Platform Module )
- Gigabit netkort v/ innbygdum RJ45 stikkið
- 802.11 a/b/g/n tráðleyst netkort
- Bluetooth
- Innbygt webcam, hátalarar og mikrofon
- Stuðla dokkingstøð (ikki USB el. Bluetooth samband)
- Stuðla 2 skermum tá teldan er dokkað
- Streymveiting til teldu og dokkingstøð = 2 stk.
- Windows 8.1 Pro OEM stýriskipan
- 3 ára garanti
- Skal vera Energy Star 5.0 góðkend
- Skal lúka umhvørvisgóðkenningar so sum Svanamerki ella EPEAT Gold

Onnur viðurskifti, sum ynskjast útgreinað:

- Vekt og stødd á teldu
- Leveringstíð
- Eru lidnir drivara pakkar til System Center Configuration Manager tøkir
- Um garanti ikki er eins fyri allar lutirnar ynskist hetta útgreinað
- Hvat er vanlig umvælingar tíð fyri garanti umvælingar

Veitarin skal vera góðkendur av framleiðaranum, antin sjálvur ella ígjøgnum triðjapart, til at gera umvælingar av telduútbúnaðinum í Føroyum.

Keypari ger vart við, at hesin tilboðsfyrispurningur er settur fleiri veitarum, og at keyparin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum innkomnu tilboðini eins og ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum.
Tilboðini verða viðgjørd og sammett av keypara. Niðurstøðan um, hvat av tilboðunum – um nakað – tikið verður av, verður grundað á eina heildarmeting við denti á tey viðurskifti, sum eru nevnd í hesum skrivi.

Soleiðis vera tilboðini vektaði:

| **Vekting:** | **%** |
|---|---|
| Prísur | 66 |
| Eyka funktiónir[**1**] | 10 |
| Vekt | 7 |
| Støddar mát | 4 |
| Leveringstíð | 2 |
| Drivara pakkar til SCCM | 7 |
| Tænastustig á garanti umvælingum | 4 |
| Samlað | 100 |

[**1**] Eyka funktiónir er tað, sum teldan hevur útyvir minstu krøvini. Tað kann verða meira RAM, størri CPU, DVD-drev, kort lesari, USB3.0 o.s.fr. Tað vil vera ein meting í hvussu nógv hvør eyka funktión telur.

Um vøran verður latin seinni enn til avtalaðu tíð, tilskilar KT Landsins sær rættin til at taka hettar við í viðgerðina tá næsta útboð er til viðgerðar.

Tilboðið skal stílast til:

KT Landsins T-postur: ktskivan@gjaldstovan.fo

Tilboðini skulu verða send við telduposti til KT Landsins, ktskivan@gjaldstovan.fo, í PDF formati.

Øll, sum hava latið tilboð inn, fáa svar um niðurstøðuna. Keypari metir seg kunna geva svar, um tikið verður av tilboðinum ella ikki, umleið 1 viku, eftir at tilboðsfreistin er farin.

Umboð frá veitara eru vælkomin at seta fram spurningar um veitingarætlanina og tilboðsgrundarlagið í síni heild, um ávís viðurskifti ynskjast greinað nærri.

Slíkir spurningar skulu so vítt møguligt verða settir fram og annars viðgjørdir skrivliga við tí fyri eyga lættari at kunna skjalprógva samskiftið.

Spurningar av slíkum slag skulu stílast til:

Høgni Rúnason Øster
hogni.runason.oster@gjaldstovan.fo
Tlf: 352492
Fartlf.: 792492

Við hesum verður takkað fyri áhugan og verður sæð fram til at hoyra aftur frá tykkum.

Vinaliga heilsan

**Høgni Rúnason Øster**
KT Landsins
Tænastuumsitari